# Skúlastýrisfundur

Dato: 23.10.2012

Tíð: 17.00 – 18.30

Til staðar: Eyðun Lisberg, Tórarinn á Rípuni, Anna Petersen, Jórun Simonsen, Magnus Svarthamar, Martin Petersen og Høgni Warberg

Skrivari: Høgni Warberg

Skrá:

1: Felags foreldratiltakið í heyst, við uppskotið um fyrilestur av Jóhannes Miðskarð
2: Fíggjarætlan skúlans – fyri komandi ár.
3: Ymiskt

Att 1: Avgerð varð tikin um at skipa fyri felags foreldratiltakið týsdagin tann 20. Nov 2012. Samtykt var, at foreldrini møta kl. 18.30, har tey fyrst vera til ein stuttan foreldrafund inni í floksstovunum, har m.a. foreldraumboð verða vald. Síðan varð avgerð tikin um at fáa Jóhannes Miðskarð at halda fyrilestur kl. 19.30.

Att 2: Fíggjarætlan skúlans – fyri komandi ár var til ummælis.

Att 3: Høgni greiddi frá um skúlastýrisvalið, sum verður tann 13. Novembur.
Tosað varð um at arbeiða víðari við ætlanum at skipa fyri einum garðdegi, har arbeitt verður við at menna skúlaøki.

Vegna skúlastýrið
Høgni Warberg, Skrivari